# Creamy við lágum blussi

**Poppduoin Creamy hevur ongan plátusáttmála í løtuni, og tær báðar genturnar hava ikki spælt nógv seinastu tíðina**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Tað er ikki longur sama ferðini á Creamy, sum tað plagdi at vera, tá ið sangir sum Æblemand og Krabbesangen tóku donsk og føroysk børn á bóli.

Føroyska Rannvá og danska Rebecca vóru tað heilt stóra í donskum tónleiki fyri tveimum og trimum árum síðani, men nú gera tær ikki nógv um seg.

Fløgunar hjá Creamy vóru givnar út av RecArt í Århus, men í løtuni er einki samstarv millum partarnar.

– Avtalan, sum vit høvdu við Creamy, er útgingin, og í løtuni hava vit ongar ítøkiligar ætlanir um at gera nakað nýtt samstarv, sigur Jens Ove Friis, stjóri fyri RecArt.

– Vit tosa tó av og á við managerin hjá teimum, og hvør veit, hvat tað kann hava við sær í framtíðini, sigur hann.

## Sett ymiska kós

Jens Ove Friis heldur, at Creamy var nakað heilt serligt, tá ið tær komu fram, men nú eru tær ikki longu børn, og tí gevur tað onga meining, at tær gera eina nýggja fløgu við barnasangum.

– Eg veit, at Rannvá og Rebecca framvegis eru góðir vinir, men tey hava sett eitt sindur ymiska kós. Rannvá er farin á háskúla, meðan Rebecca hevur klárað seg væl í sang-leikinum um Gummi Tarzan.

– Tað er trupult at siga, um Creamy nakarantíð fer at geva eina fløgu út aftur, men møguliga kunnu tær koma fram hvør í sínum lagi sum songkvinnur, sigur Jens Ove Friis.

Tað verður tó møguleiki at hoyra Creamy á palli seinni í ár, tí tær báðar genturnar skulu hava onkrar framførslur á festivalum í summar.











# Stríðið ímillum Finn og Páll eru barnalótir

**– Hetta má halda uppat beinanvegin, sigur Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins, um opna stríðið ímillum tveir av sínum floksfeløgum**

OPIÐ STRÍÐ
*Áki Bertholdsen*

– Orðadrátturin ímillum Finn Helmsdal og Páll á Reynatúgvu eru barnalótir.

Tað heldur Høgni Hoydal um hvassa stríðið seinastu dagarnar ímillum tveir av floksfeløgum hansara, Páll á Reynatúgvu, landsstýrismann, og Finn Helmsdal, sum hevur havt sæti á tingið fyri Annitu á Fríðriksmørk.

Men tað er eisini at kalla tað einasta, hann vil siga um tvídráttin ímillum tei báðar.

Stríðið ímillum teir báðar bleiv óinballað lagt fyri almenningin í Løgtinginum fríggjadagin, tá ið Finnur Helmsdal ikki vildi atkvøða fyri einum uppkoti frá Páll á Reynatúgvu um at avtaka stuðulin til uppihaldspening.

Tað fekk Páll á Reynatúgvu at siga, at Finnur var bara varamaður á tingið og at hann var bara øvundsjúkur inn á landsstýrissessin.

Hetta fekk Finn Helmsdal í rættiligari hvassorðaðari grein í Sosialinum í gjár at kalla Páll á Reynatúgvu perfidan.

– Eg havi sagt tað fyrr og eg kann siga tað aftur: Eg geri ikki viðmerkingar til persónlig stríð yvirhøvur, sigur Høgni Hoydal.

Hann vil ikki taka dagar ímillum, hvør av teimum báðum hevur gjørt hetta til eitt persónsmál. Men hetta er barnalótir, sum mugu halda uppat beinanvegin, sigur Høgni Hoydal.

Hann heldur, at tað politiska, sum fór fram í tinginum hendan fríggjadagin, er nógv meiri álvarsligt enn persónsmálið ímillum teir báðar tingmenninar.

– Tað, sum hendi var, at tjóðveldisflokkurin breyt eina avtalu, sum er gjørd í samgonguni.

– Og tað er sera álvarsligt, tí eg havi altíð lagt stóran dent á at tjóðveldisflokkurin skal halda tær avtalur, sum eru gjørdar, hvussu truplar tær enn eru, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur tí, at málið fer at verða tikið upp í flokkinum skjótast gjørligt.

## Sigur ósatt

Høgni Hoydal sigur eisini, at Finnur Helmsdal sigur beinleiðis ósatt.

– Finnur Helmsdal sigur, at hann hevur kunnað meg um hansara støðu í málinum, tá ið tað var til 1. viðgerð langt fyri páskir. Tá skal eg hava lovað honum at taka málið upp í flokkinum, men tað gjørdi eg ongantíð.

– Eg skilji ikki, at hann kann føra hetta fram, tí hetta er beinleiðis ósatt. Tað, sum hendi, var, at táið málið var til 1. viðgerð, fekk eg at vita, at Finnur Helmsdal ikki vildi atkvøða fyri. Tá ringdi eg til hansara og boðaði frá, at talan var um eina avtalu í samgonguni og tað var hann bundin av. Tí bað eg hann lata vera við at siga nakað undir 1. viðgerð, og hevði hann trupulleikar, mátti hann sjálvur taka tað upp.

– Tað má sjálvsagt vera so, at eru tingmenn ónøgdir og vilja hava okkurt broytt, mugu teir sjálvir taka stig til at viðgera málini so at tey verða broytt. Tað kann ikki vera uppgávan hjá einum floksformanni at finna útav, nær ein tingmaður er ónøgdir. Eru teir ónøgdir, eiga teir sjálvir at taka trupulleikan upp, so at hann kann verða loystur.

## Eru tinglimir bundnir ella ikki?

Men tað er beinleiðis álagt einum tinglimum at atkvøða eftir síni egnu sannføring?

– Sjálvsagt hava tingmenn frælsi til bæði at tala og gera, sum teir vilja. Men politikarar eru valdir fyri ein flokk. Og skal ein flokkur kunna virka, verður hann noyddur at gera semjur.

– Og eitt tað týdningarmesta í politikki er, at tað ber til at líta á, at ein flokkur stendur við tær avtalur hann ger, tí tað er sjálv fortreytin fyri at fáa framt politikkin hjá flokkinum í verki, sigur Høgni Hoydal.

Vit kunnu leggja afturat, at í grein 23 í stýriskipanarlógini stendur, at »løgtingsmaður er bert bundin av sannføring síni og ikki av forskriftum frá veljarum sínum«.

Sambært løgtingsformanninum, Edmund Joensen, merkir hetta eisini, at ein løgtingsmaður er ikki bundin at politiskum avtalum.

Tað skilst á Høgna Hoydal, at hann metir tað sera álvarsamt, at tjóðveldisflokkurin hevur brotið eina avtalu og at málið fer at vera tikið upp.

Hevur so Finnur Helmsdal nakra framtíð í flokkinum eftir hetta?

– Hetta er ein trupulleiki hjá tjóðveldisflokkinum, sum vit mugu taka upp fyri at tryggja, at vit kunnu halda tær avtalur, vit gera. Og persónsviðurskifti havi eg framvegis ongar viðmerkingar til, tí tað sigi eg við rætta viðkomandi



*– Høgni Hoydal vil ikkisiga um hann er nøgdur við sína dømikraft, tá ið landsstýrisfólk hjá tjóðveldisflokkinum eru tilnevnd. Men hann heldur, at tað eru tey politisku avrikini sum telja og at tað er ein ógvuliga stórur trupulleiki, at so stórur dentur verður lagdur á persónsmál*

## Ein stórur trupulleiki

Vit spurdu eisini formann tjóðveldisfloksins, hvat hann sigur til tað, sum Páll á Reynatúgvu hevur ført fram um, at Finnur Helmsdal er bara varamaður og er øvundsjúkur inn á landsstýrissessin. Er tað ikki eitt sindur niðurgerðandi ímóti einum tingmanni?

– Eg geri ikki viðmerkingar til tað persónliga í málinum. Tað havi eg ongantíð gjørt.

Tjóðveldisflokkurin hevur havt trý landsstýrisfólk, Tórbjørn Jacobsen, Annlis Bjarkhamar og Páll á Reynatúgvu. Tað skerst ikki burtur, at tað hevur verið rættililiga nógv stríð um júst hesi trý landsstýrisfólkini. Nú hevur tú havt ein týðandi leiklut, tá ið tey skuldu tilnevnast í landsstýrið. Ert tú nøgdur við tína egnu dømikraft, tá ið landsstýrisfólk skulu veljast?

– Eg geri ikki viðmerkingar til persónsmál yvirhøvur. Men tá ið landsstýrisfólk verða tilnevnd, eru tað heilt aðrar metingar, sum vera gjørdar, enn metingar um tað persónligar. Vit skulu lata politisku avrikini tala. Vit skulu eisini hava við í metingunum, at virksemið hjá landsstýrismonnum er rættiliga nógv frammi í fjølmiðlunum.

– Og eg haldi, at tað er ein ógvuliga stórur trupulleiki í føroyska samfelagnum, at alt verður gjørt til persónsmál. Tað verður ómetaliga stórur dentir lagdur á at dyrka persónligar ósemjur, heldur enn at viðgera tey veruligu politisku málini og tí tað er ógvuliga oyðileggjandi.

Men er tað løgið í hesum føri, tí orðavalið í lesarabrævinum hjá Finni Helmsdal í Sosialinum í gjár, er óhoyrt, serliga tá ið hugsað verður um, at hann er varamaður á tingi og at talan er um hansara egna landsstýrismann?

– Eg havi ongar viðmerkingar til persónsstríð, tí tað eru barnalótir, sum vit eiga at halda uppat við beinanvegin.

